# Húsaskorð og heimagjørt í gongugøtuni



*Omaneftir allari gongugøtuni stóðu borð í tveimum røðum*



*Hvørja skal eg velja?*



*Eisini inni í Joto-holinum og stóðu borð allan vegin inn*

**Sunnudagin var pinnpakkað av fólki í gongugøtuni í Havn, tá ársins loppumarknaður var í gongugøtuni í Havn**

FÓLKALÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Risastóri loppimarknaðurin, sum var í gongugøtuni í Havn sunnudagin, var ein dundrandi succes, sum heilt sikkurt verður endurtikin. Hetta siga tey úr Margarinfabrikkini, sum hevði tikið stig til loppumarknaðin, har fólk kundu leiga sær eitt borð fyri 200 krónur. Peningur, sum skuldi brúkast til eitt nýtt pool-borð í ungdómshúsinum.

- Vit eru sera væl nøgd við tiltakið, sum hepnaðist nógv betur, enn vit høvdu torað at vóna, sigur Annika Gregoriussen, varaleiðari í Margarinfabrikkini. Hon fortelur, at tað tey leigaðu 55 borð út, og at øll lótu sera væl at.

- Fólk vóru nakað so positiv, og fleiri heittu á okkum um at skipa fyri hesum aftur – minst tvær ferðir árliga. Hetta vísir okkum bara, at stórur tørvur er á at brúka miðbýin, og at fólk eru fegin um at sleppa av við gamlir lutir og ymiskt, sum tey sjálvi hava gjørt, sigur Annika, sum leggur afturat, at eisini børnini og tey ungu í Margarinfabrikkini vóru væl nøgd.

- Nú er ikki langt eftir, til vit hava ráð til eitt nýtt pool-borð, sum jú var endamálið við øllum, sigur hon at enda.


## Leiðari til Barnagarðin við Kráir í Hvalvík



Søkt verður eftir leiðara til barnagarðin at byrja tann 1. oktobur 2008 ella eftir nærri avtalu

Talan er um fulltíðarstarv, og tann setti skal hava námsfrøðiliga útbúgving.

Barnagarðurin liggur í hugnaligum og barnavinarligum umhvørvi, nærhendis Stóránni, sum sostatt eisini er eitt gott íkast til gerandisdagin. Stovnurin er skipaður við fýra stovum, umframt frítíðarskúla, ið heldur til við Margáir í Streymnesi.

**Vit ynskja:**

- At tú hevur hug og hegni at leiða, dugir at samstarva og ert fyrikomandi.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og foreldrunum.
- At tú hevur hug at skapa og seta dám á okkara dagstovn.
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- At tú hevur ein virknan lut í samstarvinum við hinar leiðararnar á dagstovnaøkinum í kommununi.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til verandi leiðara í barnagarðinum, Nancy Poulsen, tlf. 772021, ella leiðaran á sosialu deild, tlf. 471022 ella 771023.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 15. septembur 2008**, og skulu sendast til:

Sunda kommunu
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki

SUNDA KOMMUNA

Barnagarðurin við Kráir í Hvalvík er ein av trimum dagstovnum í Sunda Kommunu, ið allir eru nýggir og væl útgjørdir. Barnagarðurin er normeraður til 60 børn, og har eru í løtuni 12 starvsfólk. Dagstovnaleiðarnir í økinum, tvs. í Hósvík, á Oyrarbakka og í Hvalvík, hava eitt gott og tætt samstarv á økinum í samráð við kommununa.

sansir.fo